DAGSINS MEINING

Uttanveltað

Spurningurin um støðu Føroya, um USA og Bretland loypa á Iraq kann skjótt gerast sera aktuellur. Tá lopið varð á Afghanistan varð frá føroyskari síðu givið grønt ljós til at flogfør úr USA við bumbum og hernaðarútgerð brúkt føroyskt loftrúm. Hetta var moralskt ein sera ivasom avgerð. Nú er hesin spurningur í veruleikanum eitt ríkismál, hvørt loyvi til yvirflúgving skal verða givið, men siðvenja er helst, at stjórnin spyr landsstýrið, áðrenn hon gevur slík loyvi. Tí eiga vit at umhugsa hann her og nú.

Eitt hernaðarligt álop á Iraq er eitt stórt moralskt problem fyri Vesturheimin. Her verður talan um eitt fyribyrgjandi kríggj, og er hetta sera óvanligt í vesturlendskum verjuhøpi. Tað er als eingin ivi um, at stjórnin í Iraq er bæði harðrend og ódemokratisk, og at iraqiska fólkið er kúgað og satt í svárari neyð. Spurn-ingurin er tó, um hesin trupulleiki verður loystur á besta hátt við einum hernaðarligum álopi. Eitt slíkt álop viðførir ræðuleikar fyri irakiska fólkið og fer at geva Vesturheiminum ómetaligar politiskar trupulleikar mótvegis serstakliga muslimska heiminum og tríðja heiminum sum heild. Afturat hesum kemur, at tað finst ein hópur av stjórnum kring heimin,ið kunnu metast javnt við stýrið í Iraq. Er USA ikku moralskt pliktað at beina hesar stjórnir burtur á sama hátt, sum gjørt verður við Saddam Hussein og hansara einarættið? Hvørjar fylgjur hevði tað havt fyri heimin, um USA konsekvent fór undir eina rød av fyribyrgjandi kríggjum? Vit kenna svarið frammanundan, men eiga kortini at seta spurningin.

So er tað spurningurin um støðu Føroya í einum komandi stórálopi á Iraq. Tá og um tað brestur á, fara vit at fáa sama spurning sum seinast, nevniliga um vit vilja leggja land og loftrúm til. Hetta er ein sera álvarsamur spurningur, sum løgmaður og uttanlandanevndin eiga at umhugsa sera gjølla. Føroyar hava hildið seg uttan fyri hernaðarósemjur landa millum í øldir. At vit við stórum menniskjansligum kostnaði fluttu fisk til Bretlands undir seinna heimsbardaga broytir ikki hesa mynd. Løgtingið hevur, hóast tingið ongan formliga myndugleika hevur á økinum, fleiri ferðir boðað frá, at Føroyar eiga at vera uttan fyri hernaðarligar ósemjur. Hetta hevur verið og er ein sera klók støða. Hesa støðu eiga løgmaður og uttanlandanevnd oðrumegin og Danmark og USA hinumegin at virða. Føroyar og føroyingar kunnu ikki moralskt liva við at valda iraqiska fólkinum ella fyri alt tað nøkrum øðrum fólki neyð og oyðileggingar í einum stríði, sum ikki er okkara.

Nú um dagarnar var friðargonga í Havn móti kríggi í Irak. Eftir tað sendi Fólkaflokkurin bræv til danska stjórnarflokkin, har hann tók undir við tess politikki í Irakmálinum. Sambart skrivinum taka eisini landsstýrismenn Fólkafloksins undir við hesum skrivi. Vit ganga út frá, at tá tað verður skrivað landsstýrismenn Fólkafloksins, so fatar hetta eisini um løgmann, tí flokkurin hevur bert ein landsstýrismann umframt løgmann. Er hetta rætt tulkað og skilt, so má tað sigast at vera sera løgið, at løgmaður, sum annars ikki hevur viljað úttalað seg til bløðini um sína støðu í Irakmálinum, nú glaðbeintur letur seg brúka (mis) av sínum starvsfelaga á tingi, Óla Breckmann.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Fólkaflokkurin og Irak

Niels Midjord

Týsdagin nevndi Útvarpið so hissini, at Fólkaflokkurin hevði sent eitt skriv, har hann gav USA sín fulla stuðul í ætlanum teirra viðv. Irak og Saddam Hussain.

Óheppin løta at vísa sín stuðul, sjálvt um nøkur autoritetstrúgv NATO-limalond hava kent seg noydd at gera tað sama.

Tí bæði Frakland og serstakliga Týskland hava sagt seg vera ímóti einum álopi á Irak, og t.d. hevur enska kirkjan boðað frá, at eitt sovorið kríggj kann ikki rættvísgerast.

Eisini í sjálvum USA hava mótmæli verið, t.d. hava tey flestu,ið fingið hava Nobel-viðisløn haðani skriva og mótmælt ætlaða krígnum.

Men hvat er tað so fyri høvuðsgrundgeving, sum Bush hevur, fyri at fara í kríggj?

Hann sigur, at Saddam Hussain er ein hóttan tí at hann møguliga hevur hópoyðingarvápn, og tí er kríggið neyðugt.

Lat okkum siga at hetta er rætt og at irakar higartil hava dugað at fjalt vápnini fyri ST-eftirlitsfólkunum.

Men eru tað hópoyðingarvápnini, sum gera allan munin, hvør man so hava fleiri hópoyðingarvápn av teimum báðum, Hussain ella Bush?

Tí lítil ivi man vera um at USA hevur hópoyðingarvápn, sum teir eisini nýttu í Vietnam-krígnum, millum annað undir tí tiltikna jólabumbuálopinum. – Tað, sum fekk John Lennon at skriva sangin: Now it is Christmas.

Hetta bendir so á, at verðins hættislígasti maður kanska als ikki eitur Saddam Hussain ella fyri alt tað Osama Bin Laden; men heldur George W. Bush.

Ein grundin til at fólkaflokkurin hevur sent hetta stuðulsskriv er kanska, at teir vilja hava Føroyar upp í NATo, og tað er ivaleyst nattúrligt við tað at vit eru partur av tí økinum, sum verjusamgongan umfatar.

Men um NATO skal nýtast sum stuðul til at bumba fátæk ella lítið á leið komin lond, so eiga vit at halda fingrarnar langt burtur frá tí samgonguni.

Restorffs dansur

TÍÐINDASKRIV

Restorffs Bryggjarí fer tvær ferðir um árið at hava eitt dansitiltak í Sjónleikarhúsinum til frama fyri einum góðum samfelagsligum tiltaki. Fyrsta dansikvøldið verður leygarkvøldið 15. februar. Gott orkestur við kendum solistum fara at standa fyri tónleikinum, sum verður lættur og góður. Hóast Vertshúsið ikki er liðugt inn verður ábit har seinni um náttina. Restorff hevur sjálvt boðið umleið 200 gestum, men vil fegin bjóða øðrum 100 dansigloðum fólki við til tiltakið. (sí lýsing í blaðnum ídag) Fólk kunnu seta seg í samband við Restorff og melda seg til.

Tiltakið er ókeypis, men fólk fáa høvið at lata ein styrk sum hesuferð óskerður fer til nýstovnaða tiltakið við sorgarbólkum fyri børn, sum hava mist foreldur.

Móttøka í Sparikassanum í Runavík

TÍÐINDASKRIV

Tann 1. februar 2003 varð Jónleif Th. Jacobsen settur sum deildarleiðari og Kristine Ellingsgaard sum varaleiðari fyri deildirnar í Eysturoy. Fráfarandi leiðarin, Tummas M. Jacobsen, hevur avgjørt at taka við nýggjum avbjóðingum í Sparikassanum.

Í hesum sambandi verður skipað fyri móttøku fríggjadagin 7. februar kl. 15 – 17 á deildini í Runavík. Sparikassin bjóðar øllum hjartaliga vælkomnum inn á gólvið.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Uppvenjingardeildin E3

Ein kunnan til politikarar og onnur áhugað

Vegna røktarstarvsfólkið á E2
Sólbjørg Símunarson og Monica Brickman, sjúkrarøktarfrøðingar
E3, 23. januar 2003

Herfyri stóð ein grein í Sosialinum, skrivað av Charlottu á Váli Olsen, sum tá umboðaði Miðflokkin á tingi, millum annað um tørvin á eini deild fyri fólk við skaða aftaná blóðtøppi ella bløðing í heilanum (apopleksi): »Einari apopleksideild, har sjúklingarnir kunnu vera í tryggum hondum hjá útbúnum fólki«. Hetta vísir greitt, at greinskrivarin als einki visti um, at tílík deild longu er á Landssjúkrahúsinum. Vit hava frá deildini kunnað Charlotte á Váli Olsen um uppvenjingardeildina E3, men hon er kanska ikki tann einasta av okkara politikkarum og øðrum áhugaðum, sum ikki veit um E3, tí hendan grein við kunnan um deildina og søgu hennara.

Frá almennari heiliráðdeild til serdeild

Nógv munnu minnast sparingarnar, sum vóru av tí mesta fyrst í 90-unum. Á røktar og heiliráðdeild E2/E3, sum heldur til í tí langa svarta bygninginum frammanfyri Landssjúkrahúsið, vístu sparingarnar seg við afturvendandi hóttanum um niðurskering ella niðurlegging av deildini, og sýntust vónirnar fyri at varðveita deildina sera lítlar.

At tørvur var á hesum bæði røktar- og heiliráðplássum, var tó eingin ivi um, tí deildin var altíð fullsett. Men arbeiðsumstøðurnar versnaðu støðugt av tí ótryggleika, sum tær afturvendandi hóttanirnar góvu, samstundis sum starvsfólkið á deildini vildi berjast fyri at varðveita deildina.

Tí tók røktarstarvsfólkið stig til nýhugsan um júst eina intensiva uppvenjingardeild fyri tey, sum vóru rakt av apopleksi. Tær vunnu sær neyðugan kunnleika um uppvenjingarhættir og fingu fysioterapeutar og ergoterapeutar við í arbeiðið. Tá tær vendu sær til sjúkrarøktarleiðsluna á Landssjúkrahúsinum, vórðu tær væl móttiknar.

Skjótt frá hugsan til verka

Longu í 1991 var deildin, sum fevndi um 9 pláss, í gongd! Bæði sjúkrarøktarfrøðingar og sjúkrahjálparar fingu upplæring í dagligari venjing av apopleksisjúklingum, soleiðis at venjingin ikki einans fer fram, meðan sjúklingurin er í fysioterapi ella ergoterapi, men hvørja ferð eitthvørt skal fara fram: Tá sjúklingurin fer í og úr song, flytir úr einum stóli í annan, skal vaska sær, undir brúsu, lata seg í, fáa sær at eta/drekka, stutt sagt undir øllum dagligum handlingum. Fyri at styrkja musklarnar og fyribyrgja feilstøður í musklum/liðum verður stórur dentur lagdur á, hvussu ein liggur í seingini, situr í stólinum og at gera dagligar venjingar, áðrenn farið verður í gongd við dagsins verki.

Hetta er sjálvandi sera orkukrevjandi, og tí mátti normeringin (starvsfólkaprosent per sjúkling) vera hægri enn á hinum heiliráðdeildunum. Men úrslitini vóru samstundis sera sjónlig: Sjúklingar, sum higartil vórðu liggjandi í seingini og kanska lyftir upp at sita av 2 portørum, kundu nú við hjálp av einum fólki fáast upp at sita og kanska standa! Eisini tað, at fáa ein tungan røktarsjúkling til ein lættan, er ein stórur vinningur. Fyri tann einstaka sjúklingin merkti hetta, at hann ella hon, um umstøðurnar annars vóru nøktandi, kundi sleppa heimaftur og luttaka í heimlívinum, í staðin fyri at vera vístur til røktarheim, um pláss var, ella bara tað at vera seingjarliggjandi heima.

Aðrir sjúklingar komu og koma nógv longur: Við intensivari venjing síggja vit menn og kvinnur, sum ikki ein gongd megnaðu at bera høvdið, nakrar mánaðar seinni fara við stavi í hond gangandi av deildini.

Ómøguligt á øðrum heiliráðdeildum

Hesi úrslit eru ómøgulig at rokka á deildum, sum eisini hava sjúklingar við øðrum sjúkum. Fyri tað fyrsta tí, at tey ofta ikki hava orku til tess, og fyri tað næsta, tí at tað at røkta apopleksisjúklingar krevur serkunnleika og seráhuga.

Brek, sum ikki eru at síggja

Ein annar sera týdningarmikil partur av arbeiðinum á E3 er saman við ergo- og fysioterapiini at uppdaga og greina brek, sum kunnu koma av heilaskaðanum, men sum ein ikki verður varur við, uttan at ein veit, at tey kunnu vera har. Til dømis kann rúm-, tíðar-, krops- ella sitatiónsfatanin vera skadd soleiðis, at ein maður ella kvinna, sum gongur væl og fær brúkt báðar hendur, ikki dugir at kenna klokku ella uppliva tíðarlongd, ikki dugir at skyna avstand ella ikki dugir at uppfata samskiftið manna millum/ í einum felagsskapi. Hesir skaðar kunnu kanska venjast uppaftur, og í øllum førum kann tann brekaði, og ikki minst kunnu familjan/tey nærmastu fáa kunnleika um brekið og læra at liva við tí.

Tað er ikki torført at hugsa sær, hvussu trupla støðu fólk kunnu koma í, tá tey koma heim, um hesi brek ikki eru vorðin kend undir innleggjanini. Til dømis tá ein maður, sum ikki kann meta um avstand fer at koyra bil!

Somuleiðis er uppvenjingin av teimum, sum hava expressiva ella impressiva afasi (ikki fáa tosa ella ikki skilja tað, ið sagt verður) saman við talulæraranum sera týdningarmikil.

Vón um betri arbeiðsumstøður

Røktarstarvsfólkið á E3 hevur í fleiri ár barst fyri at fáa betri umstøður til deildina. Bygningurin er gamal og uppslitin, bygdur fyribils fyrst í 1960'unum og ofta ber ikki til at gera arbeiðið so væl, sum til hevði borið við størri og meira hóskandi hølum. Sera nógv arbeiðsorka fer óneyðuga. Sum dømi, kunnu vit nevna støðuna við máltíðirnar: Sjúklingarnir mugu oftast hava sítt fasta pláss, alt eftir hvussu teir eru lammaðir ella skaddir. Tí hendir tað við hvørja máltíð, at ein ella fleiri sjúklingar mugu flytast fyri at fáa rúm fyri øðrum sjúklingum, sum koma seinni til borðs – ella um tann, sum situr innast skal frá borðinum! Hetta tí, at bert fáir sjúklingar fáa gingið sjálvir, og flestu sita í koyristóli.

Eitt annað átrokandi mál er, at fáa rúm og umstøður til at móttaka akuttar apopleksisjúklingar. Hagtøl uttanlanda vísa, at framtiðarvónirnar eru so nógv betri, um hesir sjúklingar verða innlagdir beinleiðis á eina serdeild, tí nógvir óbøtandi skaðar henda tey fyrstu døgnini aftaná blóðtøppin/bløðingina.

Tíverri er E3 als ikki við í hugsanini, nú nýbygningur tekur útsýnið frá núverandi deild.

Bert 5-7 pláss

Í 6 av teimum seinastu 7 mánaðunum í 2002 vóru 4 av teimum 9 seingjarplássunum stongd vegna sparingar og starvsfólkatrot. Fyrst í januar opnaðu 2 pláss aftur, tað vil siga, at deildin í løtuni einans hevur 7 seingjarpláss.

At hetta ber til, at ófatuligt, tí árliga fáa millum 70 og 100 fólk í Føroyum apopleksi, og vísa serfrøðingar uttanlanda á, at øll, sum fáa apopleksi, eiga at verða innlagd til kanningar og viðgerð, so sjálvt 9 pláss eru alt ov fá! Verða tey raktu ikki innlagd, er tað stórur menniskjansligur missur bæði fyri tann sjúka og teirra avvarðandi.

At hetta peningaliga eisini er sera kostnaðarmikið vísa kanningar í øðrum londum.

Sparing í løtuni kann verða kostnaðarmikil

Í 1994 kom eitt rit frá Sunnheitsstýrinum við heitinum »Apopleksibehandling – fremtidig organisation« greidd úr hondum av arbeiðsbólki viðvíkjandi viðgerð av apopleksi. Seinasti partur í ritinum nevnist »Ressourcemæssige overvejelser« og har verður sagt: »Internationalt er skjalprógvað, at sjúklingar, sum verða viðgjørdir á apopleksideildum, verða skjótari útskrivaðir og við einum betri virkistøði enn sjúklingar, sum verða viðgjørdir á traditionellan hátt. Samstundis verður deyðligheitin niðursett. Tey góðu úrslitini sýnast fyrst og fremst at koma av skjótt byrjaðari relevantari sjúkrarøkt/rehabilitering«. (s. 73-74) og: »Royndirnar vísa, at tann intensiva hjálpin gevur styttri liggitíð og harvið lægri sjúkrahúsútreiðslur. Samstundis hava sjúklingarnir eitt betri virkisstøði aftaná útskrivanina, sum gevur færri útreiðslur til enduruppvenjing, sosialar útreiðslur við meira«. (s. 75)

Við hesum í huga saman við teimum royndum vit hava frá E3 hesi árini, hon hevur virkað, heita vit á okkara politikkarar at virka fyri, at intensiva uppvenjingardeildin fyri apopleksirakt í Føroyum fær høvi til at verða útbygd.

Og meðan hugsað verður um sparingar/brúk av ressoursum, er kanska gott at minnast til, at talið av apopleksiraktum komandi ár helst ikki lækkar men hækkar, tí talið av eldri eins og talið av fólkum við hjarta-karsjúkum og sukursjúku økist, og júst hesir bólkar eru útsettir fyri at fáa blóðtøpp ella bløðing í heilan.

Konsert við Prix-bólkum

TÍÐINDASKRIV

Nú leygarkvøldið 8. februar kl 22.00 verður hin næsta konsertin í røðini við prix -aktuellum bólkum í Losjuni í Gøtu.

Hesuferð eru tríggir rokkbólkar á skránni.

Nummar tvey frá 2. umfari í prixnum seinasta leygarkvøld, Mind´s Eye úr Klaksvík saman við tveimum nýggjum bólkum úr Eysturoynni, Mary´s Baby og Bracket - hesir verða báðir við í prixnum 15. februar.

Mind´s Eye vóru sera væl dømdir eftir umfari 1. februar. Teir spæla harðan rokk í stíl við bólkar sum t.d. Limp Bizkit.

Bracket spæla progressivan rokk og manningin telur millum annað guitarsnillingin Arna Zachariassen, sum er kendur m.ø. frá I Am og sangarin er Andrias Højgaard, sum gjørdist nummar 2 í ársins songrødd kappingini 2001.

Mary´s Baby hevur eisini eina fyrrverandi ársins songrødd finalist við í manningini. Tað er frálíka evnaríka Olivia Mikkelsen, sum gjørdist nr 2 í ársins songrødd 2002. Onkur av manningini er eisini kendur úr bólkinum Marigold.

Tiltakið verður leygarkvøldið kl 22.00 í Losjuni í Gøtu. Kostnaðurin er

80 kr, tó fyri limir í Grót einans 50 kr.

ONKUR BINDUR FRIÐ

Onkur vil frið
við friði
onkur vil kríggj
fyri friðin
annar vil friðin
við kríggi
triði vil kríggj
við kríggi
-
fáur veit
frá kríggi
at siga
uttan
tann deyði
-
onkur demagogspíri
sigur seg vilja frið
við kríggi

sprænir eitur
í smáum
ómerkjandi
niðrandi
óátalaður
ótálmaður
hálur
sum álllur
og
opportunistur
-
VÆLSIGNAÐUR
veri hann
sum bindur
FRIÐ

Erling S.